

*– Skulu vit lesandi útisetar flyta heimaftur eftir loknan lestur? Tað er treytað av, at hesi fólkini - frøðingarnir, journalistarnir og listafólkini – fáa meiri pengar at arbeiða við, skrivar Heini í Skorini í ársins jólaklummu*

# Tví vorðið tykkum, tit frøðingar, journalistar og listafólk!

**KLUMMA**

*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*



– Harmaljóð úr London og ein jólaheilsan til Pál Weihe, Jón Brian Hvidtfeldt, Hans Tórgarð, Anniku Sølvará, Jonhard Mikkelsen og onnur.

Bank, bank, bank! Hvør kemur at vitja nú? Eg skræði meg úr songini. Tað er seinnapartur og bølamyrkt uttanfyri. Farna náttin gjørdist í so drúgv. Vatn og tyggigummi sum skjótast. Og í einar brøkur.

Áðrenn eg varnist, stendur ein bulmikil maður inni í myrku stovuni í kjallaraíbúðini.

– Hvat skal gerast fyri at fáa tykkum lesandi útisetar heimaftur?, spyr ein djúp rødd.

– Øøøhh... Eg yppi øksl og leiti eftir onkrum søtum at borðreiða við. Nakrar hálvgamlar piparnøtur er einasti fongurin til óbodna gestin. Arbeiðsmedisinarin og hatursobjektið hjá føroyskum grindafanatikarum, Pál Weihe at navni.

Hann er komin at spyrja, um eg kann hava eina framløgu fyri limunum í felagsskapinum Rotary, sum hevur árliga samkomu í næstum, um hendan sama spurning: Hvussu fáast føroysk lesandi heimaftur eftir loknan lestur úti í stóru verð?

Hetta var áðrenn, at Sjúrður Skaale og Norðuratlantsbólkurin í summar løgdu fram frálíku kanningina, sum núverandi løgmaður royndi at órógva, og sum skjalprógvaði, at meirilutin av føroyskum útisetum heilt einfalt ikki tímir til Føroya eftir loknan lestur.

Eg helt ongantíð nakran fyrilestur fyri Rotary. Var fluttur til Ísrael, tá borgaraskapurin sessaðist til háborðs á Hotel Føroyum. Men eg og Pál fingu hendan seinnapartin fyri einum knøppum ári síðani, millum jóla og nýggjárs í fjør, eina frálíka samtalu um ein av mest átrokandi trupulleikunum í føroyska samfelagnum: At lesandi føroyskir útisetar ikki tíma at búgva í Føroyum.

Og eitt samfelag, sum ikki megnar at halda um sítt útbúna tilfeingi, er eitt samfelag, sum ikki gongur eini bjartari framtíð á møti. Andliga. Sosialt. Og búskaparliga.

***

Men tað hava flestir føroyskir politikarar ikki skilt. Fram til 19. januar skróluðu tey øll um altjóða universitet. Um munadyggar hækkingar til gransking. Um fleiri pengar til tey fólkini, sum eru orsøkin til, at tað í heila tikið ber til at fara til sjónleik, til konsertir og til listaframsýningar í Føroyum. Við trú og heiður vórðu fleiri pengar lovaðir til tey, sum eru orsøkin til, at føroyskur skaldskapur yvirhøvur finst. Til tey, sum vilja granska í Føroyum og um Føroyar. Til allar tær spríkjandi sálir, sum ímóti øllum líkindum syrgja fyri, at tilvitskan, hugarenslið, tann frælsi tankin, tann stimbrandi andliga innspræningin, verður hildin á lívi í hesum landinum. Í hesum útjaðaranum yvir øllum útjaðarum – sum vit gud hjálpi mær so eisini skulu føra útjaðarapolitikk í.

Valstríðið borðreiddi við so søtum tónum frá einum so einmæltum kóri, at ein loyvdi sær at spæla við vónini. Vónini um, at intellektuelli samfelagskapasiteturin nú fór at fáa eina fíggjarliga innspræning.

Men eina fíggjarlóg eftir valið hevur Setrið framvegis ikki fingið annað enn náðiligar framskrivingar frá seinastu fíggjarlóg. Føroyar nýta framvegis langt frá teimum trimum prosentunum av bruttotjóðarúrtøkuni til gransking, sum er lágmarkið hjá OECD. Seinastu tølini hjá Anniku Sølvará og Granskingarráðnum vísa 0,87 pínlig prosent, meðan grannalondini liggja langt omanfyri.

Hans Tórgarð hevur framvegis ikki fingið uppiborna løn fyri óteljandi framúr framførslur á eyðmjúkum leikhúsum í Havn. Jonhard Mikkelsen hevur framvegis ikki fingið hóskandi herðaklapp fyri ótroyttiliga orðabókaarbeiðið. Jenny Petersen brýtur framvegis lógina fyri Tjóðpallin hvønn dag, tí hon við núverandi játtan ikki kann liva upp til hesa lóg. Rói Patursson má framvegis venda deyva oyrað og blinda eygað til skikkaðar umsøkjarar, sum ynskja sær nøkur oyru frá Mentanargrunni Landsins.

Og brátt kikkar Kringvarpið enn einaferð eftir ondini. Størsta frambrotið í mínari tíð sum fjølmiðlajunkie var 62 Norður, tá Dánjal Højgaard, Dagmar Joensen Næs, Jón Brian Hvidtfeldt og onnur borðreiddu við fyrstafloks journalistikki, men sum bráðliga hvarv. Nú er kjakið í sjónvarpinum eisini tveitt á øskudungan. So stutt eftir, at vit fegnaðust um stóra frambrotið at fáa dagligt kjak inn í stovurnar. Og ein erlig journalistisk dokumentarsending er sum lundi á jólanátt. Gudi viti, hvussu Jón Brian hevur tað. Tíðindaleiðarin, sum fattur fór til verka, men sum nú er hertikin av einum politiskum veruleika, sum liggur vetrarbreytir frá hansara visjónum um sonevnda Public Service stovnin.

Úrslit? Eitt samfelag, sum ikki er nóg attraktivt at búgva í. Eitt samfelag, sum ikki megnar kappingina við tann stóra heimin við universitetum so stórfingnum, fjølmiðlum so kveikjandi, mentanarlívi so gevandi og andligum almennum hugarensli so stimbrandi, at Føroyar, sum ongantíð fer úr hjørtum vár, hoknar undan og megnar ikki kappingina.

Ein grotesk andsøgn, tá tað samstundis hoyrir við til søguna, at vit hava heimsins bestu stuðulsskipanir til lesandi, SU og ÚSUN, sum undirritaði fegnast um hvønn dag undir mínum MA-lesnaði í London. Stóri trupulleikin er bert at skapa fortreytir fyri, at virðini koma heimaftur. At íløgan kemur okkara egna samfelagi til góðar.

***

Nær steðgar galskapurin? Nær fatar ein meiriluti í løgtinginum, at eitt samfelag, sum við krónum og oyrum ikki hámetir útbúgving, dygdargóðar fjølmiðlar, listafólkini og granskararnar, er eitt samfelag, sum spakuliga drenar sítt andliga innihald? Sum í smáum bitum avreiðir sítt intellektuella tilfeingi til útheimin? Sum lutar frá sær vøru nummar eitt í fagra, nýggja heiminum? Nær fáa mentamálaráðharrar við hjartanum á røttum staði heimild til at fremja neyðugu broytingarnar?

Kanska hongur trupulleikin saman við einum ávísum hugburði, sum av og á er at hóma, tá eg eri heima. Tá tilmælini frá fiskifrøðingunum viðvíkjandi niðurskurðinum í árligu fiskidøgunum var til løgtingsviðgerð í summar, froystu tinglimir eftir syndarunum yvir øllum syndarum: Akademikarunum í Havn! At hesir, ja, hugsið tykkum til, at hesir frøðingarnir nú skuldu takast uppá ráð, var einki minni enn blasfemi ímóti føroyskari mentan, sum ein vissur harri tók til.

Tá Magni Laksáfoss sum nýklaktur fíggjarmálaráðharri vágaði sær at nýta sofistikerað frøðishugtøk úr búskaparfrøðiligu orðaskjáttuni, høvdu táverandi samgongufelagar at honum og mintu staðiliga á, at nú var hann ikki akademikari longur. Nú var hann landsstýrismaður og skuldi gera so væl at uppføra seg sum ein. Og tá landslæknin og óbodni jólagestur mín fyri stuttum løgdu fram tilmæli við støði í vísindaligum arbeiði, sum mælir frá at eta dálkaða tvøstið, kókaði okkara høga løgting aftur yvir í primitivari vanvirðing ímóti serfrøðini.

***

Í londunum kring okkum eru frøðingarnir mest eftirspurda vøran. Í londunum kring okkum hevur gud og hvør maður, sum fæst við politikk, langt síðani fata, at vitaminir til intellektuella tilfeingið er vegurin fram. At væta og sól til andligu blómurnar, sum við ymsum listagávum halda lív í føroyskum andslívi, er ein lívsneyðug atdráttarmegi.

Men í Føroyum eru frøðingarnir eitt ivasamt fólkaslag. Journalistarnir ein stætt, sum ikki skal gerast ov sterk. Og listafólkini ein eyka rokning, tá alt annað er goldið.

So, góði Pál. Eg og mong við mær vilja so fegin koma heimaftur. Vit gleða okkum sum smábørn at flúgva heim til høgtíðirnar. Og tað verður enn betri, tá onkur politikari sær ljósið, nationaliserar privatiseraða triðingin av Atlantic og fer í hernað ímóti múrinum av dýrum ferðaseðlum, sum kringsetir oyggjarnar.

Men skulu vit veruliga flyta heim til hetta?

**Jólablaðið 2008**
Sosialurin
Postboks 76
Fo-110 Tórshavn

REDAKTØRUR
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

BLAÐFÓLK
Anna V. Ellingsgaard
Eirikur í Jákupsstovu
Eydna Skaale
Heini í Skorini
Heri Simonsen
Inna Tornroos
Kári Mikkelsen
Leo Poulsen
Magnus Gunnarsson
Óli Jacobsen
Rigmor Dam
Rógvi Nybo

LÝSINGAR
Marknaðardeildin
lysing@sosialurin.fo

MYNDIR
Jens Kristian Vang
Álvur Haraldsen

PERMA: Andras Nybo